# Kunning um sjóhita í Leirvík

## Góðu leirvíkingar!

Sum fleiri av tykkum vita, so hevur í longri tíð verið arbeitt við eini sjóhitaverkætlan í Leirvík.

Støðan er nú tann, at kommunan hevur viðtikið at fara undir eina sjóhitaverkætlan, sum fer at veita fjarhita til kommunalu bygningarnar í Leirvík, sum liggja frá skúlanum/Giljagarði og inn til Nánd.

Hendan verkætlan hjá kommununi verður gjørd soleiðis, at tað verður møguligt hjá allari bygdini at knýta í hana, um áhugi er fyri tí.

Tí ber til at stovna eitt fjarhitafelag, sum kann veita hita og heitt vatn til privathús.

Kanningar vísa, at henda orkuskipanin er umleið 10 % bíligari enn oljufýringar, samstundis sum hon dálkar nógv minni.

Ein sjóhitaskipan virkar soleiðis, at tveir triðingar eru hiti úr sjónum, meðan ein triðingur er el-orka. Helvtin av el-orkuni, sum SEV framleiðir, er í dag grøn – vatn og vindur. Sostatt eru umleið 70 prosent av hitanum frá eini sjóhitaskipan frá grønari, varandi orku.

Leggjast kann afturat, at vit hava verið í sambandi við Net, og teir siga, at um so verður, at verkætlanin til privat húsarhald verður framd, og veitir grivnar til húsini, eru teir sinnaðir at leggja netrør í veitina , so øll húsini kunnu fáa fipursamband. Net vil tá eisini vera við til at gjalda fyri grevsturin.

Orka, Fríðfinnur Johnsson og Jákup Tróndheim arbeiða í løtuni við einum uppskoti um, hvussu hetta fjarhitafelagið skal skipast og hvussu vit kunnu koma í gongd sum skjótast.

Tá ið hetta kanningararbeiðið er liðugt, verður kallað inn til almennan fund, har ið verkætlanin verður løgd fram.

Vit rokna við, at kunnandi fundurin verður síðst í januar ella fyrst í februar.

## El-orka + sjóhiti = hiti til hús




Tey, ið hava áhuga fyri frágreiðingini, sum ráðgevndi verkfrøðingafelagið Cowi hevur gjørt um verkætlanina, kunnu fara inn á heimasíðuna hjá Eysturkommunu: www.eysturkommuna.fo

**Soleiðis verður gjørt:**

1 Sjógvinntak verður úti á Kráartanga

2 Slangur verða lagdar frá Kráartanga niðan til skúlan, har hitamiðstøðin fer at vera

4 Miðstøðin fer at hava orkutanga, hitatangi góðar 100 rúmmetur

5 Fjarhitarør verða løgd til til bygningarnar hjá kommununi og kirkjuna

6 Møguleiki verður at knýta fleiri fjarhitarør í orkumiðstøðina við skúlan, og harvið fáa alla bygdina knýtta í skipanina

*Vegna stigtakararnar*

*Fríðfinnur Johnsson og Jákup Tróndheim*